# Betri og tryggari umstøður hjá smábátum

**BÁTAR** Í seinastuni hevur Klaksvíkar kommuna gjørt sítt til at bøta um umstøðurnar hjá smábátunum í bátahylinum í Árnafirði.

Snorri Brend

Arbeiðið fevnir um at gera eina atløgusíðu inni í bátahylinum, samstundis sum ein hevur arbeitt við at leingja atløgusíðuna fram við landi.

Tað er Byggifelagið Kanjon, ið hevur hetta arbeiði um hendur, sum byrjaði á heysti í fjør.

Men Klaksvíkar kommuna ætlar meiri enn hetta í Árnafirði, ið er partur av hesi kommununi.

Næst á skránni er at leggja bylgjubrótara framman fyri innsiglingina til bátahylin. Og á landi er ætlanin at seta upp ljóssteyrar og skáp til elveiting til bátarnar.

– Ætlanin er eisini, at leggja armar út frá bátabrúgvunum, verður sagt úr Klaksvíkar kommunu.

Samlaði kostnaðurin av hesum verður um 1,5 mió krónur, og verður alt arbeiðið væntandi liðugt um einar tveir mánaðar.




*Bæði á landi, við bátabrúgvarnar og á sjónum skulu arbeiði gerast fyri at gera tað so trygt sum tilber hjá smábátunum at liggja við bryggju her í Árnafirði*

*Mynd: Klaksvíkar kommuna*

# 70 fólk til hjúnabandsdag

**Leygardagin varð á fyrsta sinni skipað fyri hjúnabandsdegi í Hoyvíkar kirkju. Eitt av endamálunum við tiltakinum var at styrkja og menna hjúnalagið.**



Tað vóru prestarnir í Suðurstreymoy sum tóku stig til henda dagin, sum varð merktur av fyrilestrum og orðaskifti.

Til tiltakið hevði tað eydnast at fáa fatur á Fróða Madsen, cand. ped. psyk., sum býr í Danmark, men annars er ættaður úr Havn.

Honum varð litið til at halda fyrilestrarnar um hjúnabandið generelt, hjúnabandið í kristiligum høpi og um samskiftið og kenslur í hjúnabandinum.

Hjúnabandsdagurin byrjaði um morgunin og helt á til út á seinnapartin.

Sum nevnt vóru eini 70 fólk til henda hjúnabandsdagin, og komu tey bæði úr bý og úr bygd.

*snorri@sosialurin*

# GLS fyrireikar nýggja stevnu í heyst

GLS-leiðsluráðstevnan verður í ár hildin í døgunum 21. og 22. oktober. Eins og undanfarin ár verður hon hildin í Norðurlandahúsinum.

Á stevnuni í fjør, vóru fleiri enn 300 leiðarar úr øllum landinum koma saman til eggjan og leiðaramenning. Í ár verður vónað at eitt eins stór tal fer at taka lut.

Fyrireikingarnar til stevnuna eru longu byrjaðar, og fyri at fólk kunnu fylgja við í fyrireikingunum hevur stevnan fingið nýggja heimasíðu. Við nýggju síðuni, sum eitur www.gls.fo, ynskir GLS at kunna um og seta ljóskastaran á leiðslu.

– Við nýggju heimasíðuni ynskja vit somuleiðis at gera arbeiðið hjá GLS í Føroyum enn sjónligari, verður sagt.

Á síðuni fæst kunning um til dømis talarar, sum verða á næstu leiðsluráðstevnuni, møguleiki er at melda seg til stevnuna og rinda gjøgnum heimasíðuna. Ein YouTube filmur eins og viðmerkingar frá luttakarum frá stevnuni í fjør eru á síðuni.

Myndir og annað tilfar frá undanfarnu GLS-tiltøkum lagdar út, eins og tað eisini ber til at finna leiðslutilfar, fjølmiðlatilfar og aðrar viðkomandi upplýsingar um GLS á síðuni.

*snorri@sosialurin.fo*

## Oyggjablaðið næstu ferð: SUÐUROY

**Í Oyggjablaðnum mikudagin seta vit fokus á ymisk viðurskifti í Suðuroy: Lesið í hesum blaðnum:**



**Kamma – eitt lív við depresjón**



**Niels brennur fyri tunli til Hvalbiar**



**Shaila svimur og svimur**



**Bjarni strevast sum útróðrarmaður**



**Vera – eitt lív í koyristóli**